Forkunnugt bókmentatiltak í Norðurlandahúsinum:

# Úr Suðuroyggjum til R



Aðalsteinn Ásberg Sigurðsson

**Seks frægir, fjølbroyttir og ymiskligir rithøvundar úr næstu grannaoyggjum okkara fyri norðan og sunnan fara at bera fram og lesa upp úr egnum verkum, tá Rithøvundafelag Føroya skipar fyri einum áhugaverdum og heldur sjáldsomum bókmentatiltaki í Norðurlandahúsinum, mikukvøldið 6. septembur.**

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Heðin M. Klein, sum er nevndarlimur í Rithøvundafelagnum greiðir frá, at hetta man vera á fyrsta sinni, at føroyingar fáa høvi at hoyra rithøvundar ættaðar úr Íslandi, Hetlandi, Orknoyum og Suðuroyggjum/Hebridunum bera fram og lesa upp saman. Tað verða teir seks høvundarnir: íslendsku Aðalsteinn Ásberg Sigurðsson, Gyrðir Elíasson; Lise Sinclair av oynni Fair Isle; Matthew Wright av Orknoyum; Donald S. Murray av Hebridunum og hetlendska Jen Hadfield, ið fara at bera fram og lesa upp úr egnum verkum á bókmentatiltakinum, sum Rithøvundafelagið skipar fyri í Norðurlandahúsinum, mikukvøldið 6. septembur.

Umframt høvundarnar fara Spælimenninir, sum jú eru væl kendir við hetlendskan fólkatónleik, at tríva í ljóðførini – og ikki er óætlað, at ikki onkur av høvundunum fer at leggja uppí eisini!

Tiltakið, sum er ókeypis, byrjar mikukvøldið 6. septembur kl.19.30 stundisliga og varir í um leið tveir tímar.

**Aðalsteinn Ásberg Sigurðsson, føddur í 1955 í Húsavík á Norðurlandinum í Íslandi og vaks upp har á leiðini.**

Eftir at hann var farin í íslendska handilsháskúlan í Reykjavík, las hann íslendskt mál, tónleik og leiklist.
Í 1977 læt hann fyrstu bók sína koma út, yrkingasavnið Ósánar lendur (Ósátt lendi). Síðan hevur hann givið út 10 yrkingasøvn, bæði upprunaverk og týdd, eina skaldsøgu og 8 barnabøkur. Umframt bøkur hevur hann givið út nógvar upptøkur við sínum lýrikki og sangum. Seinastu yrkingasøvn hansara eru Eyðibýli (Frágingin hús) 2004, við ljósmyndum eftir Nøkkva Elíasson, og Romsubókin (Ramsubókin), barnabók 2005. Aðalsteinn býr í Reykjavík og er fulltíðar høvundur, sangskrivari og útgávumaður, bæði við tónleiki og bókmentum.

**Matthew Wright var føddur og vaks upp í Kirkwall í Orknoyum. Hann las eitt skiftið lívfrøði í Edinburgh, har hann av álvara varnaðist sítt íborna stikni til býarlívið!**

Aftan á at hann var givin at arbeiða sum barrvørður og sjó-starvsstovutøkningur og var fluttur aftur til Orknoya, kom hann so smátt fyri seg aftur eftir tey strevnu studentsárini.
So flutti hann til Hetlands, og nú býr hann í Hammavoe á oynni Burra. Har fór hann at lesa síni egnu handrit. Hann hevur skrivað stuttsøgur, líka síðan hann dugdi at halda á einum penni, men ikki fyrr enn nýliga er hann farin at lata tær frá sær á prenti. Orð hansara eru komin á prent í The Pull of the Moon og Northwords, og hann hevur lisið upp á Wordplay bókastevnuni í Lerwick.



*Matthew Wright*